**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI VÁGSBOTN OG SKÁLATRØÐ**
SB_Tórshavn_VágsbotnurSkálatrøð_2021_1_202x

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

Yvirskipaða endamálið við hesi byggisamtykt, er at aktivera, at gagnnýta og at menna staðbundna dámin á ein hátt, sum hóskar til kringliggjandi maritima umhvørvið. Markið fyri serstøku byggisamtyktini kann sum frá líðir víðkast, so byggisamtyktin fevnir um størri partar av økinum við Skálatrøð.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, matr. nr. 186, 187, 188, 190 191b, 192, 193, 195 og 201, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

Stk. 2. Økið verður býtt sundur í eindirnar A, B og C samsvarandi fylgiskjali 2.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaða- og miðstaðabygging á økinum, samsvarandi fylgiskjali 3.

Stk. 2. Økið liggur í 2. grundumráði, sum sambært almennu byggisamtyktini skal brúkast til bústaða- og miðstaðabygging.

Stk. 3. Sambært kap. II, § 3, stk. 7 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri 2. grundumráði, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, víkjast frá ásetingum um mest loyvda nýtslustig og hædd.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Øki A

1. Økið verður lagt til bústaða- og miðstaðabygging.
2. Niðasta hædd móti sjóvarmálanum og Vágsbotn torginum skal nýtast til útvent virksemi sum handil, matstovu, kaffihús ella líknandi.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,9. Óbygdi parturin av grundstykkinum skal kunna innrættast við feittbrunni, rottanga, boriholi ella tílíkum, um hetta gerst neyðugt.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 2.
5. Í samband við umbygging av verandi bygningum skulu bygningarnir ikki gerast hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna.

6. Matr. 186, neystið við Vágsbotn, er undantikið hesar ásetingar, og skal umbygging, ið kann broyta útsjónd húsanna ikki fara fram uttan loyvi frá býráðnum, og skal útsjónd húsanna í størst møguliga mun varðveitast í tráð við lýsing í fylgiskjali 3.

Stk. 2. Øki B

1. Økið verður lagt til bústaða- og miðstaðabygging.
2. Niðasta hædd móti sjóvarmálanum, Skálatrøð og Bøgøtu skal nýtast til útvent virksemi sum handil, matstovu, kaffihús ella líknandi.
3. Niðasta hædd móti sjóvarmálinum skal verða trekt 1,5 m frá markinum.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,9. Óbygdi parturin av grundstykkinum skal kunna innrættast við feittbrunni, rottanga, boriholi ella tílíkum, um hetta gerst neyðugt.
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 2,2.
6. Hús skulu ikki vera hægri enn 8,5 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna, mált frá lendi við Vágsbotn.
7. Økið frammanfyri matrikkulin oman ímóti sjóvarmálanum kann innrættast og skipast til uppihald og sitipláss. Hetta skal gerast eftir avtalu millum eigara og kommunu.

Stk. 3. Øki C

1. Økið verður lagt til bústaða- og miðstaðabygging.
2. Niðasta hædd móti sjóvarmálanum, Skálatrøð og Bøgøtu skal nýtast til útvent virksemi sum handil, matstovu, kaffihús ella líknandi.
3. Niðasta hædd móti sjóvarmálanum skal verða trekt 1,5 m frá markinum.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 1,4.
6. Byggjast skal við mønureising. Kvistar ella kvistaskap skulu gerast oman ímóti sjóvarmálanum og niðan ímóti Gríms Kambansgøtu.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 11,5 m til hægsta punkt við útvegg og 13,5 m til mønuna.
8. Økið frammanfyri matrikkulin oman ímóti sjóvarmálanum kann innrættast og skipast til uppihald og sitipláss. Hetta skal gerast eftir avtalu millum eigara og kommunu.
9. Matr. 192, Gamle Danmark, er undantikið hesar ásetingar, og skal umbygging, ið kann broyta útsjónd húsanna ikki fara fram uttan loyvi frá býráðnum, og skal útsjónd húsanna í størst møguliga mun vera í tráð við lýsing í fylgiskjali 3

## **§4. VEGIR OG PARKERING**

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Økið er ein týðandi býarframsíða, og skal øll bygging í økinum gerast í samráð við kommununa.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging. Í hesum sambandi verður víst til fylgiskjali 3, sum er vegleiðandi fyri útsjónd húsanna.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 25/20545 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 18/9-2025 |
| Váttað: | |

**Serstøk byggisamtykt fyri**
**Vágsbotn og Skálatrøð**

# FYLGISKJAL 1

Kort yvir økið dagf. 26.11.2024



**Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð**

# FYLGISKJAL 2

Kort yvir økið dagf. 30.04.2024



**Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð**

# FYLGISKJAL 3

Økisætlan dagf. 25.11.2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Býarskipanardeildin



**Stutt um økið**

Økið millum Vágsbotn og Skálatrøð er merkt av eginleikum, sum gera hetta til eitt serligt stað í miðbýnum. Staðbundni dámurin ber brá av teimum søguslóðum, sum síggjast aftur í lendinum, í gøtunum og í summum av teimum bygningunum, sum standa her.

Býarkipanarliga, er talan um eitt stórt varðveitingarvirði í hesum økinum. Eitt nú kann nevnast økið, har Tróndargøtu rennur oman í Gríms Kambans gøtu. Hetta økið, sum áður varð rópt ”Í Grind”, er lutfalsliga lítið broytt síðani fyrst í farnu øld tá økið varð nýtt sum ruskpláss áðrenn vegurin fram við sjóvarmálanum varð fyltur út (sí pílin á myndini til høgru). Vanligt var at spáka oman higar tí júst hesin staðurin er útsýnisgóður í mun til at hyggja at skipum, bátum og sluppum, sum lógu á Vestaru vág, umframt at her sæst bæði dómkirkjan, Tinganes, Skinnarasker og út á Argjalandið.
Vestanfyri vóru traðir og smiðjur í gamlari tíð. Onkrar av teimum gomlu smiðjugrundunum standa enn, og eru síðani vorðnar ábygdar og umbygdar, men húsini hava í ávísan mun varðveitt sítt skap.

Umframt hetta kann nevnast, at gomlu amtmanshúsini, sum áður vórðu nevnd ”Gamle Danmark” enn standa, sum tey síggjast á gomlum myndum, og líta út yvir vestaru vág.

Býarskipanarligu tættirnir eru fleiri, sum eiga at varðveitast í hesum økinum, men ymisk viðurskifti eru eisini, har ábøtur kunnu gerast, og har lendið kann gagnnýtast betri, so at tær hóska betri til kringliggjandi maritima umhvørvið.

Orsakað av at bygda umhvørvið er ymiskt háttað og at lendisligu dygdirnar eru ymiskar, verður økið býtt upp í trý undirøkir (Øki A,B og C).




2023



1920



Munnin á Tórsgøtu oman á Vestaru vág, eisini nevndur ”í Grind” umleið 1920.
Úr bókini Havnamyndir fyrr og nú - eftir Birgar Johannesen

**Endamálsorðing**

Endamálið við at broyta byggisamtyktina er:

1. At aktivera.
2. At gagnnýta.
3. At menna staðbunda dámin.

1. Sólargóða økið í Vágsbotni og undir Bryggjubakka hevur seinastu árini ment seg til eitt vælumtókt trivnaðarøki, har kaffihús, matstovur og sølumarknaðir hava innrættað seg og gera sítt til at nógv fólk savnast her. Økið millum Vágsbotn og Bøgøtu liggur sum eitt náttúrligt framhald av hesum økinum. Við hesi byggisamtykt er endamálið, at økið kann aktiverast og gerast karmur um trivnað og uppihald av ymsum slag, heldur enn, at virka sum eitt óvirkið býarrúm, sum stórt sæð bert verður nýtt sum gonguleið millum Vágsbotn og Skálatrøð.

2. Ein stórur partur av økinum hevur í langa tíð staðið óbygt, ella hevur verið útlagt til bilstøðupláss. Ein partur av økinum er lendisskrái, sum hvørki er atkomiligur ella gagnnýttur, hóast her er grønt og vakurt. Í verandi støðu kennist hesin skráin sum ein lendislig avbyrging millum Tróndargøtu, Gríms Kambans gøtu og maritima umhvørvið niðanfyri, bátahylin og bryggjuna. Lendisskráin í hesum økinum kundi tískil verið gagnnýttur til fleiri endamál, sum kundu lagt lunnar undir at økið bleiv betri knýtt saman, og at økið, umframt at vera grønt, í støðum eisini kann nýtast til uppihald, útvenda smávinnu og bústaðir. Soleiðis kundu fleiri fermetrar í økinum fingið eina virkna funktión.

3. Staðbundni dámurin og søguliga slóðin í økinum, eigur at verða varðveitt í størstan mun gjørligt. Tískil verður dentur lagdur á at halda fast í staðbundna arkitektoniska skalanum, skipanini, og lendisligu motivunum í økjunum har tað tænir einum býarskipanarligum endamáli. Men har møguleikar eru fyri býarskipanarligari menning og eini meira skynsamari lendisgagnnýtslu, gerst møguligt at skriva nýggjar søgur, umframt at ein enn sterkari staðbundin samleiki kann mennast í einum maritimum og fólksligum umhvørvi.



## Hugsjón fyri økið






# Serstøk byggisamtykt

## Fyri Gríms Kambansgøtu og Vágsbotn

Dagf. 15.10.2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## ØKI A

Øki A fevnir um matr. nr. 186,187 og 188.

Bygningarnir, sum standa her eru samanbygdir, og teir eru ymiskir í skapi og hædd. Teir hava eisini stórt byggilistarligt og søguligt spenni.

Neystið (matr. nr. 186), sum er tann elsti og norðasti av hesum bygningunum, er fyrst bygt í umleið 1750. Neystið er bygt í siðbundnum føroyskum byggisniði, og er lutfalsliga væl varðveitt í tveimum hæddum við lagaðari grund, við timburklædningi, sprossavindeygum og flagtekju við siðbundnari mønureising. Neystið er mett at hava varðveitingarvirði, sambært býaratlasinum hjá Tórshavnar Kommunu, og skal útsjónd húsanna varðveitast í tráð við viðhefta myndatilfarið.

Høgi miðbygningurin (matr. nr. 187) er bygdur á gamlari neystagrund, men varð í árunum 1945 - 1960 umbygdur til pakkhús. Sum eitt eindømi í økinum stendur hesin bygningurin í 4. hæddum har tvær tær ovastu hæddirnar eru framskotnar út um matrikkulin norð-eystureftir.

Bygningurin ytst ímóti sjónum (matr. nr 186) varð bygdur sum pakkhús seint í 1920'unum, og stendur í trimum hæddum, har kjallarahæddin er niðurgrivin nakað í lendið vestureftir.

Umvælingar á verandi bygningar eru loyvdar, men stórvegis broytingar á bygningarnar mugu fyrihalda seg til ásetta nýtslustigið.
Hetta merkir sostatt, at um talan verður um umvælingar, skulu núverandi bygningar ikki gerast hægri enn teir eru í dag.

Orsøkin til hetta er, at í verandi støðu avmarka bygningarnir sólarljósið niður í torgið í Vágsbotni. Um bygningarnir verða hægri enn teir eru i dag, vildi hetta avmarkað ljósumstøðurnar uppaftur meira.

Felags fyri øki A, B og C er, at hetta verður verandi eitt øki til blandaða mistaða- og bústaðabygging. Miðstaðarbygging merkir, at her mugu einans vera hús, sum verða innrættaði til handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tílíkt.

Útvent virksemi skal vera í niðastu hædd.

Krav verður ikki sett til atknýtt bilstøðupláss í sambandi við nýggja bygging, men víst verður til almennu bilstøðuplássini í nærumhvørvinum.




Byggilinja



*Viðlíkahald av neystinum í Vágsbotni skal fyrihalda seg til skapið og útsjóndina, soleiðis sum lýst í myndunum.*



## ØKI B

Øki B fevnir um matr. nr. 190 og 201.

Hetta er smalasti parturin av yvirskipaða økinum, og er lendismunurin millum Gríms Kambans gøtu og Vágsbotn rættiliga stórur (4m).

Hetta øki varð áður nevnt ”Niðri á bakka” og tíðum ”Jomfrúbakkin”. Sermerkt fyri hetta øki var, at tað, hevði ein dám av at vera eitt bindilið millum land og hav, av ti at tað varð nýtt sum rekreativt uppihaldsøki við útsýni yvir vágnað, har býarumhvørvið í Tróndargøtu rann saman við útróðrarvirkseminum á landi.

Stýrandi fyri ásetingarnar í hesum partinum eru tættleikin til aftanfyriliggjandi bygningarnar, og ymsar týdningarmiklir sjónar-ásar í nærumhvørvinum.

Partur av matr. nr. 201 er lagdur til byggilendi sýndur við reyðum á myndini til høgru, og hesin parturin ikki byggjast hægri enn upp í veghædd á Gríms Kambans gøtu.

Byggjast kann út í mark, og grundhæddin skal nýtast til útvent virksemi.

Har fleiri hæddir verða bygdar, skal grundhæddin verða trekt 1,5m inn frá markinum á teirri framsíðuni, sum vendir oman ímóti sjónum.

Økið frammanfyri matrikkulin oman ímóti sjóvarmálanum skal innrættast og skipast til uppihald við sitiplássum.

Um bygningar verða samanbygdir ella uppíbygdir, skal dentur leggjast á eina byggilistarliga samanrenning so ella so. Eitt nú, soleiðis at samanrenningin millum fleiri bygningsformar er eyðsýnd við antin framsíðubrotum, forskjótingum, umframt í liti ella tilfari.
Endamálið við hesum er at halda fast í einum lutfalsliga fittligum byggiskala, og hugsjónini um smærri samanbygd hús ella neyst, sum er siðvenja í føroyskari neystabygging sum heild, og eisini í nærumhvørvinum Undir bryggjubakka.

Felags fyri øki A, B og C er, at hetta verður verandi eitt øki til blandaða mistaða- og bústaðabygging.

Miðstaðarbygging merkir, at her mugu einans vera hús, sum verða innrættaði til handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tílíkt.

Útvent virksemi skal vera í niðastu hædd.

Krav verður ikki sett til atknýtt bilstøðupláss í sambandi við nýggja bygging, men víst verður til almennu bilstøðuplássini í nærumhvørvinum.



**ØKI B**

Prinsippskurður



## ØKI C

Øki C fevnir um matr. nr. 191b, 192, 193, og 195.

Øki liggur sum ein kneysi í lendinum, og frástøðan til kringliggjandi bústaðarbygging er størri enn í øki B. Mett verður tí, at her kunnu aðrar ásetingar gerast í mun til nýggja bygging enn í øki A og B.

Økið ber í dag dám av grøna vøkstrinum, sum er settur niður í lendisskráanum millum vegin í Vágsbotni og Gríms Kambans gøtu í erva.

Matr. nr. 192, fyri munnan á Tróndargøtu hevur verið ábygdur frá umleið 1880, og allarhelst áðrenn tað. Húsini eru upprunaliga vestari armur av gomlu amtmanshúsini, sum vóru niðurtikin og flutt miðskeiðis í 1880'unum. Síðani vóru húsini rópt "Gamle Danmark", har m.a. cafévirksemi var fram til 1924. Húsini eru síðani endurbygd og umvæld, men hava varðveitt sítt yvirskipaða upprunasnið. Húsini eru mett at hava varðveitingarvirði, sambært býaratlasinum hjá Tórshavnar Kommunu, og skal útsjónd húsanna varðveitast í tráð við viðhefta myndatilfarið.

Húsini á matr. nr. 195 eru bygd í nýggjari tíð, og standa í dag sum vertshús og matstova.

Tá tað snýr seg um nýbygging ella heildarumvæling av verandi bygningum skal niðasta hædd verða avsett til útvent virksemi. Grundhæddin skal tá verða trekt 1,5m inn frá teirri framsíðuni á bygninginum, sum vendir oman ímóti sjónum. Ótaktir svalar og yvirdekkaða økið undir, har bygningurin verður afturtrektur. telja ikki við í nýtslustigið.

Økið frammanfyri matrikkulin oman ímóti sjóvarmálanum skal innrættast og skipast til uppihald við sitiplássum.

Um talan er um stórvegis broytingar á verandi bygningi, skal byggjast eftir húsasniði, sum er í trá við húsasniðið undir Bryggjubakka. Her verður serliga hugsað um bygging við mønutekjum, við kvistaskapi ella skjøldrum, sum venda út ímóti vegnum.

Um bygningar verða samanbygdir ella uppíbygdir, skal dentur leggjast á eina byggilistarliga samanrenning. Eitt nú, soleiðis at samanrenningin millum fleiri bygningsformar er eyðsýnd við antin framsíðubrotum, forskjótingum, umframt í liti ella tilfari. Endamálið við hesum er at halda fast í einum lutfalsliga fittligum byggiskala, og hugsjónini um smærri samanbygd hús ella neyst, sum er siðvenja í føroyskari neystabygging sum heild, og eisini í nærumhvørvinum Undir bryggjubakka.

Byggilinja er ásett sambært skjalinum (reyðstiplaða linjan), tó kunnu undantøk gerast um bygt verður inn í lendið.

Felags fyri øki A, B og C er, at hetta verður verandi eitt øki til blandaða mistaða- og bústaðabygging. Miðstaðarbygging merkir, at her mugu einans vera hús, sum verða innrættaði til handlar, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligir stovnar og tílíkt.

Útvent virksemi skal vera í niðastu hædd.

Krav verður ikki sett til atknýtt bilstøðupláss í sambandi við nýggja bygging, men víst verður til almennu bilstøðuplássini í nærumhvørvinum.




Byggilinja

Óbygt (grønt øki)



*Søguligu myndirnar vísa hvussu bygningurin á matr. nr 192 ("Gamle Danmark") hevur sæð út áðrenn og eftir at kvistur varð bygdur. Viðlíkahald av húsunum skal fyrihalda seg til skapið og útsjóndina, soleiðis sum lýst í myndunum.*



**ØKI C**

Prinsippskurður

